MARKAMÓTSNEVNDIN

Tórshavn, 29. okt. 2016

Almannamálaráðið
Eiragarður 2
100 Tórshavn

**Mál viðvíkjandi kvinnu í seinni helvt av 50-árunum, diagnostiserað við Alzheimers í 2013**

Markamótsnevndin hevur tíðliga í hesum mánaðinum fingið mál, sum Tórshavnar kommuna hevur sent nevndini.

Nevndin hevði fund um málið mánadagin 24. oktober 2016, men vegna tað, at limir hava verið uttanlanda og upptiknir av øðrum viðurskiftum, er avgerðin ikki endaliga skrivað og undirskrivað fyrr enn í dag.

***Um málið og gongdina í málinum***

Málið snýr seg um 57 ára gamla heimabúgvandi kvinnu. Hon fekk diagnosuna Alzheimers í 2013. Støðan versnaði skjótt, og er hon sambært læknajournalini longu svert dement og ikki longur før fyri at útføra grundleggjandi dagligdags aktivitetir, so sum at vaska sær ella fara á wc. Hon hevur eisini trupulleikar við sjónini og við at eta. Familjan skiftist um at vera um hana, umframt at hon nakrar timar um vikuna er á demenscafé.

Familjan ynskir, at kvinnan kann verða búgvandi heima, men fáa tilboð um dagtilhald um dagin, tá maður og familjulimir eru til arbeiðis.

Fyrst søkti familjan við umsókn undirskrivað 11. januar 2016 Almannaverkið um sokallaða trivnaðartænastu. Víst varð á, at konan ikki var før fyri at vera einsamøll, og at hon hevði tørv á víðkaðum tilboði, har hon kundi koma um morgunin millum 7.30 og 8.00 og verða ansað til millum kl 16.30 og 17.00.

Familjan rykti Almannaverkið eftir avgerð 24. mai 2016.

Almannaverkið svaraði ikki fyrr enn við avgerð 9. juni 2016.

Almannaverkið vísti á, at kommunan hevur høvuðsábyrgd, tá tað snýr seg um fólk við diagnosuni Alzheimers.

Almannaverkið vísti á, at tá talan um heimabúgvandi borgarar við Alzheimers sjúku, sum við

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

námsfrøðiligum stuðli kunnu mennast, kann talan eisini verða um stuðul eftir § 32 b í forsorgarlógini, men meinti Almannaverkið ikki, sum støðan varð lýst, at námsfrøðiligur stuðul var nøktandi tilboð til kvinnuna.

Sum høvuðsgrundgeving fyri at vísa málinum til kommununa vísti Almannaverkið til § 14, stk. 2, í Løgtingslóg nr. 19. frá 27. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., ið sigur, at

"Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti."

Víst varð til viðmerkingarnar til ásetingina. Almannaverkið førdi síðan fram, at henda áseting, umframt búpláss, ið er tænasta alt samdøgrið, eisini kann fevna um dagtilboð á eldraøkinum. Víst varð til henda setningin frá serligu viðmerkingunum til § 14, stk. 2: "Harafturat er týdningarmikið at taka atlit til ítøkiliga tørvin hjá borgaranum og hvørji ynski hesin hevur í mun til bústað og tænastu."

At enda vísti Almannaverkið á, at kvinnan vildi fáa eitt betri tilboð hjá kommununi, sum umvent av Almannaverkinum hevur fakligheitina og røttu tilboðini.

Familjan søkti síðan vegna kvinnuna 13. juni 2016 Tórshavnar kommununu um víðkað dagtilboð.

Tórshavnar kommuna tók avgerð við skrivi dagfest 27. juni 2016.

Kommunan vísti á, at dagtilboð til personar undir 67 ár við t.d. demens ikki er nevnt í lógini. Eisini varð sagt, at í Markamótsskjalinum frá 30. mai 2016, markamót 1, er ásett, at landið hevur ábyrgdina av at veita stuðulstænastu til vaksin heimabúgvandi frá 18 til og 66 ár við serligum avbjóðingum, soleiðis at tey hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív, og víðari at Almannaverkið samskipar tænastur til borgarar undir 67 ár, sum hava samansettan tørv, og at kommunurnar samskipa tænastur til borgarar yvir 67 ár, sum hava samansettan tørv, til ein varandi loysn er funnin.

At enda varð viðmerkt, at kommunan ikki hevur dagtilboð til heimabúgvandi yngri borgarar við Alzheimers, og at kommunan hvørki hevur skyldu ella heimild til at veita slík tilboð.

***Viðgerð og avgerð í Markamótsnevndini***

Spurningurin fyri Markamótsnevndini kann býtast í trý. Nevniliga hvørt ein tænasta sum dagtilhald til heimabúgvandi demenssjúkar persónar undir 67 ár er:

1) Kommunal ábyrgd sambært lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
2) Ábyrgd hjá landinum (Almannaverkinum) sambært § 32 b í forsorgarlógini.
3) Ikki regulerað við lóg, so at ongin myndugleiki harvið hevur ábyrgd av júst slíkum tilboði.

Viðvíkjandi fyrsta spurningi, so hevur fyrr verið víst á frá landsins síðu, at við lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (sí almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið í løgtingsmáli nr. 64/2013) varð ikki einans eldraøkið lagt til kommunurnar, men sameinda heimatænastan (heimasjúkrarøkt, heimahjálp og økisterapi), sum fevnir um allar borgarar og ikki bara tey eldru.

Tá so er, at kommunurnar eisini hava fingið ábyrgd av borgarum undir 67 ár, og tá tað er ein sannroynd, at demenssjúka vanliga er aldursrelaterað sjúka, so kann kanska verða hildið, at

kommununurnar generelt hava fingið ábyrgd av tænastum til borgarar undir 67 við demenssjúku.

Ein má tó vera varin við at gera ov víðfevndar niðurstøður grundað á meira yvirskipað sjónarmið úr almennu viðmerkingunum. Almennar viðmerkingar hava virði sum kelda til rættarstøðuna, men almennu viðmerkingarnar hava ikki eins stórt virði sum rættarkelda sum sjálvar lógargreinarnar og serstøku viðmerkingarnar.

Hyggja vit eftir sjálvum lógartekstinum og bygnaðinum í lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., so hava §§ 9-12 eina yvirskrift, ið eitur "Tilboð til heimabúgvandi".

Í mun til traditionellu sokallaðu heimahjálpina, so sigur § 9, at kommunurnar veita eftir tørvi øllum heimabúgvandi borgarum – tvs. ikki einans fólkapensjonistum – í økinum heimatænastu í styttri ella longri tíðarskeið.

Kortini er aldursmark sett á í mun til tær tænastur, sum hava til endamáls at stuðla upp undir, at borgarar kunnu búgva sum longst í egnum heimi. Grein 10 í lógini sigur í tí sambandi:

"Kommununurnar veita heimabúgvandi fólkapensjónistum – tvs. borgarum yvir 67 ár – tænastur, ið kunnu stimbra likamliga, sálarliga og sosialt soleiðis, at pensjónisturin kann búgva í egnum heimi sum longst."

Stk. 2 sigur síðan:

"Tænasturnar kunnu fevna um dagtilhald, ergoterapi, fysioterapi, endurvenjing, fyribyrgjandi venjing, viðlíkahaldsvenjing, dagtilboð, mattænastu, umlætting, koyritænastu, vegleiðing o.s.fr."

Sostatt er dagtilboð beinleiðis nevnt sum eitt av tilboðunum, ið verða veitt fólkapensjonistum, so hesir kunnu búgva sum longst í egnum heimi. Borgarar undir 67 ikki verða ikki nevndir í hesi áseting, og §§ 9 og 10 gera greiðan skilnað millum "fólkapensjonistar" og "allar borgarar".

Tilboðið, sum demenssjúka kvinnan undir 67 ár hevur tørv á, er fevnt av § 10, sum bara er galdandi fólkapensjónistar, men rúmast ikki í § 9, sum er galdandi allar borgarar.

Almannaverkið hevur sum sína høvuðsgrundgeving víst á, at § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. sigur:

"Í serligum føri kann røktarheim ella eldrasambýli eisini hýsa øðrum røktarkrevjandi persóni enn fólkapensjónisti."

Kortini stendur § 14, stk. 2, undir yvirskiftini í lógini um "Bústaðir", meðan tilboð til heimabúgvandi stendur undir omanfyri umrøddu yvirskrift "tilboð til heimabúgvandi".

Í samsvar við henda bygnaðin í lógini stendur eisini í serstøku viðmerkingunum til § 14, stk. 2:

"Ásetingin inniber, at røktarheim ella eldrasambýli í serligum førum kunnu hýsa yngri borgarum, sum eru røktarkrevjandi og sum tørva røkt alt samdøgrið." (Okkara undirstriking).

Hetta má tí alt benda á, at tørvurin hjá demenssjúku kvinnuni ikki er fevndur av lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Heldur ikki er so, at almennu viðmerkingarnar púra greitt benda tann vegin, at eitt tilboð um dagtilhald til heimabúgvandi demenssjúkan borgara undir 67 ár er fevnt av lóg heimatænastu, eldrarøkt v.m. Beint eftir, at almennu viðmerkingarnar siga: "Eisini verður sameinda

heimatænastan (heimasjúkrarøkt, heimahjálp og økisterapi), sum fevnir um allar borgarar og ikki bara tey eldru, løgd til kommunurnar", stendur síðan: "Tó hevur verið umrøtt, at gerast skal serlig gjaldsskipan millum land og kommunur viðv. teimum borgarum, sum eru undir 67 ár."

Hetta seinasta hevur sum fyritreyt, at borgarar eru – nevniliga í aldursbólkinum undir 67 ár – sum kommunurnar ikki hava ábyrgd av, og at tær tískil mugu fáa endurrindað møgulig tænastutilboð, ið tær veita slíkum borgarum.

Ítøkiligu ásetingarnar benda tískil rættiliga eintýðugt tann vegin, at tilboð sum dagtilhald til heimabúgvandi demenssjúk undir 67 ár ikki eru fevnd av lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Almennu viðmerkingarnar – sum heldur ikki eru eins autoritativar sum ítøkiligu lógargreinarnar og serstøku viðmerkingarnar til teirra – eru ikki nóg eintýðugar til, at nakað avgerandi kann sigast um, hvørja niðurstøðu tær hella til.

Eisini er viðkomandi at vísa á, eins og Tórshavnar kommuna, at í sokallaða markamótskjalinum frá 30. mai 2016, markamót 1, stendur undir Niðurstøðu og tilmæli, at Almannaverkið samskipar tænastur til borgarar undir 67 ár, sum hava samansettan tørv, og at kommunurnar samskipa tænastur til borgarar yvir 67 ár, sum hava samansettan tørv, til ein varandi loysn er funnin.

***Niðurstøða um lógargrundarlag og ábyrgd***
Samanumtikið er niðurstøðan hjá nevndini í mun til fyrsta spurningin tískil, at tænasta sum dagtilhald til heimabúgvandi demenssjúkan persónar undir 67 ár er ikki kommunal ábyrgd eftir lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Í mun til næsta og triðja spurning, so metir nevndin, at myndugleikar skulu vera sera varnir við, uttan greitt lógargrundarlag, at halda tænastur og skipanir vera farnar úr gildi, so at ongin myndugleiki hevur ábyrgd á økinum. Atlit til kontinuitet og borgarans rættartrygd tala ímóti, at slíkt kann henda uttan púra greitt grundarlag.

Almannaverkið hevur fyrr veitt borgarum við demens undir 67 ár dagtilboð við heimild í § 32 b í forsorgarlógini um at "stuðla vaksnum heimabúgvandi frá 18 til og við 66 ár við serligum tørvi, sum eru rørslutarnað ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so at tey hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív". Nevndin finnur ikki grundarlag fyri at halda, at henda áseting er broytt av seinni lóg – t.e. lóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. – og metir nevndin tískil, at Almannaverkið framvegis hevur ábyrgd av at veita borgarum við demens undir 67 ár dagtilboð við heimild í § 32 b í forsorgarlógini.

***Tilmæli um framferð***
Demenssjúka kvinnan hevur bíðað heilt síðan tíðliga í 2016 eftir myndugleikunum á økinum. Málið er ikki so torgreitt, løgfrøðiliga ella faktuelt, at hetta var neyðugt. Tískil fer Markamótsnevndin at heita á Almannaverkið um – evt. í samstarvi Tórshavnar kommunu – sum skjótast at seta eitt nøktandi tilboð á beinini. At ressursir (høli og faglig orka) og myndugleikaábyrgd ikki fylgjast, er ikki nøkur forðing, tí partarnir kunnu avtala gjaldsskipan, eins og almennu viðmerkingarnar leggja upp til.

Hóast niðurstøðuna hjá nevndini um ábyrgd, so sleptst ikki undan, at bólkurin demenssjúk undir 67 ár als ikki hevur fingið nøktandi raðfesting í sambandi við lógarreformin, tá eldraøkið varð latið kommununum. Tí fara vit at heita á Kommunufelagið og Almannamálaráðið – sbr. eisini

lyftið í Markamótsskjalinum um komandi neyvari vegleiðingar til stuðulstænastuna – um sum skjótast at koma ásamt greiðari reglur um viðurskiftini hjá demenssjúkum undir 67 ár.

Bárður Larsen, formaður

Ása Olsen

Katrin Danielsen